# Ungir gospeltónleikarar millum tey stóru

Gospelbólkurin Credo skal spæla saman við teimum stóru nøvnunum á Summar Festivalinum í august mánaði. Í bólkinum eru ungir tónleikarar úr Klaksvík

*Credo er ein nýggjur og spennandi gospelbólkur, sum hevur fingið møguleikan at spæla saman við teimum stóru og kendu nøvnunum á Summar Festivalinum*



Credo er spennandi gospelbólkur úr Klaksvík, sum spældi fyri fyrstu ferð alment á Gospel Prixnum í 2003. Tónleikararnir í bólkinum hava eisini spælt við øðrum bólkum og gera tað lutvíst enn.

Eitt av endamálunum við Summar Festivalinum er at geva lokalum tónleikarum í Klaksvík møguleikan at standa á einum stórum og spennandi palli, og á tann hátt at stimbra tónleikalívið, og hesaferð eru boð eftir Credo. Teir fara at spæla ásaman við teimum stóru føroysku og útlendsku stjørnumum á festivalinum.

Credo hevur spælt til ymisk tiltøk hetta seinasta árið, og teir skriva tónleik sjálvir. Talan er um melodiøsan popptónleik

Credo: Hans Andrias Olsen (sang), Rógvi Sivertsen (akk. gittar), Leivur Vitalis (bass og kór), Jóel Bringsberg (trummur) og Alvin Ellebye Andersen (keyboard)












# Føroysk sápa seld til Saudi Arabia

**Fríggjamorgunin fóru fyrstu tunnurnar av føroyskari sápu til Saudi Arabia. -Hetta kann skjótt gerast ein stór avtala hjá okkum, tí rækjuvirkið er stórt, men teir mugu royna sápuna fyrst, sigur søluleiðarin á Kemilux, Arni Gunnarsson**

SÁPA TIL SAUDI ARABIA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Føroyska sápufyritøkan, Kemilux, hevur fingið í lag eina slóðbrótandi avtalu við eitt rækjuvirki í Saudia Arabia. Rækjuvirkið setti seg herfyri í samband við Kemilux fyri at kanna møguleikan, um føroyingar kundu veita teimum sápu.

– Vit hava fingið nógvar fyrispurningar úr londum í miðeystri, men sjáldan kemur nakað burturúr. Hesaferð gingu kortini ikki fleiri enn tveir dagar frá, at vit høvdu svarað teimum til, teir valdu at taka av okkara tilboði, sigur Arni Gunnarsson, søluleiðari á Kemilux.

Fríggjamorgunin skuldi fyrstu tunnurnar av føroyskari sápu til Saudi Arabia fara av landinum. Tað eru danir og íslendingar, sum í felag hava bygt saudi arabiska rækjuvirkið. Á rækjuvirkinum arbeiða 2000 fólk, og virkið er 6000m2 til støddar.

Rækjuvirkið liggur rættiliga avbyrgt í oyðimørkini í Saudi Arabia

## Danir hjálpa

Spurdur, hvussu avtalan við eitt fjarskotna rækjuvirkið er komin í lag, svarar sølumaðurin á Kemilux, at á rækjuvirkinum arbeiðir ein dani, sum hevur víst á føroysku framleiðsluna.

– Á rækjuvirkinum í Saudi Arabia arbeiðir ein dani, og sum eg skilji tað, hevur hann beitað teir á okkum. Hesin danin hevur siglt við grønlendskum rækjuskipi, sum hava brúkt okkara framleiðslu, og hann kennir tí okkara sápu, fortelur Arni Gunnarsson.

Talan er um trý ymisk sløg av sápu, sum rækjuvirkið í Saudia Arabia hevur ynskt. Umframt rustloysara, er talan um tvey ymisk sløg av sápu, sum verður nýtt innandura.

## Fevna breitt

Avtalan hjá Kemilux við rækjuvirkið í Saudi Arabia er hin fyrsta av sínum slag í miðeystri. Føroyska sápuframleiðslan verður í dag seld til Grønlands, Danmarkar, Skotland, Kanada, Noreg og Týskland.

Spurdur, hvørjar møguleikar Kemilux sær í avtaluni við saudi arabar, svarar Arni Gunnarsson, at vísir tað seg, at teir verða nøgdir við sápuna, er als ikki óhugsandi, at talan verður um eitt varðandi samstarv.

– Hetta kann skjótt gerast ein stór avtala hjá okkum, tí rækjuvirkið er stórt, men teir mugu royna sápuna fyrst. Tá tú tosar um sápu, hevur vatnið ómetaligan stóran týðdning. Okkara framleiðslur eru gjørdar til, at tú hevur yvirflatuvatn, men í Saudi Arabia hava tey undirflatuvatn, og tí verður spennandi at síggja, hvussu sápan fer at roynast har, sigur Arni Gunnarsson at enda.

## 80 tons tungur pallur á Gøtusandi

G! Festivalurin nærkast, og hetta sæst nú týðiliga aftur. Pallurin, har stóru nøvnini á festivalinum skulu spæla, er nú settur upp.

Pallurin vigar eini 80 tons, og hann er nú klárur at taka ímóti útgerð og tónleikarum.

H.T. Transport syrgdi fyri at frakta tey mongu »flatsini« frá Skipafelagnum til Syðrugøtu, meðan stóri kranin frá Skipasmiðjuni í Havn varð komin allan vegin norður at lossa elementini oman á sandin.

G! festivalurin verður um eina viku.

# Brandur Patursson í Mentamálráðnum

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, lat í gjár upp listaframsýning hjá Brandi Paturssyni í Mentamálaráðnum. Landsstýrismaðurin nevndi í røðu síni, at Brandur er ungur og roynir nýggjar og spennandi leiðir bæði tá talan er um form og innihald. Hann helt framsýningina vera áhugaverda og spennandi og ynskti listamanninum góða eydnu við framtíðar listaligа virkseminum. Eisini kom landsstýrismaðurin í røðu síni inn á týdningin av myndlistini fyri tað einstaka menniskjað. Framsýningin hjá Brandi er opin til 1. oktober í ár.



*Jógvan á Lakjuni , mentamálaráðharri setti framsýningina hjá tí unga og spennandi listamanninum, Brandi Paturssyni.*

*Myndir Jens K Vang*

# Týr spælir í Týsklandi

**Føroyski rockbólkurin er í hesum døgum á ferð í Týsklandi, har teir spæla á tveimum ymiskum rockfestivalum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Føroyskur kvæðarockur rungar í hesum døgum á týskum fløtum. Týr er aftur farið á ferð, og hesaferð er leiðin løgd til tveir týskar rockfestivalar.

Fríggjakvøldið spældi Týr á Headbangers Open Air Festival í Brande, og har varð roknað við, at eini 2000 fólk fóru at lurta eftir føroyska rockinum.

16. juli spælir Týr á einum øðrum festivali, Rock-Town Open Air, har suðuri í Týsklandi.

Eini 25 týsk tíðarrit og internetsíður hava ummælt seinastu fløguna hjá Týr, og tí er møguleiki fyri, at fólk kenna tónleikin hjá Týr á hesum festivalum, sum serliga eru fyri fjepparar av hørðum rocktónleiki.

Týr hevur júst verið í Íslandi og spælt á seks ymiskum konsertum, og teir vóru sera væl nøgdir við ferðina har.

– Áhoyrararnir vóru fantastiskir. Tey sungu og livdu við tónleikinum, sigur bólkurin á heimasíðu sínari.

Týr verður eisini at hoyra í Føroyum í summar, teir skulu millum annað spæla á Ólavsøkukonsertini, og teir verða eisini við á ólavsøkuhaldinum á Bryggjuni í Keypamannahavn.